Mars 2019

betri

Tryggingartreytir

# Spreingitrygging

# Spreingitrygging

| | | |
|---|---|---|
| Lógargrundarlag og felagstreytir | | 3 |
| 1.0 | Tryggingin fevnir um | 3 |
| 2.0 | Tryggingarhædd | 3 |
| 3.0 | Tíðarskeið | 3 |
| 4.0 | Tryggjaðir lutir | 3 |
| 5.0 | Tryggingarstaður | 3 |
| 6.0 | Undantøk | 3 |
| 7.0 | Trygdartiltøk | 3 |

betri

# Spreingitrygging

## Lógargrundarlag

Fyri hesa trygging eru sama lógargrundarlag og, í tann mun tað letur seg gera, somu felagstreytir galdandi sum fyri Arbeiðstøkutrygging.

## 1.0. Tryggingin fevnir um

**1.1.** Tryggingin fevnir um miss av og skaða á tryggjaðu lutirnar, orsakað av spreingiarbeiði upp til tær í tryggingarskjalinum nevndu tryggingarhæddirnar, við frádrátti av tí ella teim í tryggingarskjalinum nevndu sjálvábyrgdunum.

**1.2 Spreinging:**
Við spreinging er at skilja ein tilætlað eksplosjón í sambandi við spreingiarbeiði. Ein eksplosión er ein sera skjótt fyrigangandi eldur (brenning) ella evnafrøðilig tilgongd.

## 2.0 Tryggingarhædd

**2.1** Hægsta endurgjald, sum Betri Trygging veitir, er avmarkað til ta í tryggingarskjalinum nevndu tryggingarhædd, fyri skaðar, sum henda í somu skaðahending ella røð av skaðahendingum,sum hava uppruna í somu skaðahending, við frádrátti av ásettu sjálvábyrgdini.

**2.2** Talan er um eina 1. risikotrygging, t.v.s., at undirtrygging ikki verður gjørd galdandi.

## 3.0 Tíðarskeið

Tryggingin fevnir um tryggjaðu lutirnar í tí í tryggingarskjalinum ásetta tryggingartíðarskeiðnum.

## 4.0 Tryggjaðir lutir

Tryggingin fevnir um tryggjaðu lutirnar, sum eru nevndir í tryggingarskjalinum.

## 5.0 Tryggingarstaður

Tryggingarstaðurin er nevndur í tryggingarskjalinum.

## 6.0 Undantøk

**6.1** Tryggingin fevnir ikki um:

**6.2** Bøtur ella endurgjald fyri:
• seinking
• vantandi fullføring
• heilt ella partvíst ikki at lúka treytirnar í sáttmálanum fyri arbeiðið.

**6.3** Rakstrarmiss ella annan óbeinleiðis miss av øllum sløgum, íroknað rentumiss.

**6.4** Endurgjaldsábyrgd av nøkrum slagi.

**6.5** Lutir hjá arbeiðstakarum ella undirarbeiðstakarum.

**6.6** Miss av vinningi.

**6.7** Beinleiðis ella óbeinleiðis skaða, orsakað av órógvi í funktiónunum í tryggjaðu lutunum uttan so, at tílík órógv eru ein beinleiðis fylgja av einum skaða, sum tryggingin fevnir um.

**6.8** Beinleiðis ella óbeinleiðis skaða av sjunking av lendi, omanlopi, skriðjulopi, skalvalopi, flóð, vatnflóð, jarðskjálvta ella øðrum náttúruvanlukkum.

**6.9** NBCR-yvirgang (Nuclear, Biological, Chemical & Radiological)
Við yvirgang er at skilja ein gerð/atgerð, íroknað - men ikki avmarkað til - brúk av makt og/ella harðskapi ella hóttan um, at makt og/ella harðskapur fer at vera nýttur, framd av einum ella fleiri persónum, uttan mun til um teir virka einsamallir ella í sambandi við ella í felag við ella vegna ein ella fleiri felagsskap/ir og/ella stjórnir og/ella myndugleikar, framd við politiskum, átrúnaðarligum, ideologiskum ella etniskum endamáli ella grundgeving, íroknað endamálinum at ávirka eina stjórn og/ella ein millumlandafelagsskap og/ella at skapa ótta í almenninginum ella parti av almenninginum.

Í hesum sambandi veitir Betri Trygging ikki endurgjald fyri NBCR-yvirgang ella sokallaðar dálkaðar bumbur: Við dálkaðar bumbur er at skilja bumbur, rakettir o.tl. løddar við vanligum (konventionellum) spreingievni og dálkaðar við geislavirknum tilfari. Hesar bumbur verða vanliga nevndar dirty bombs. Sama er galdandi fyri bumbur, sum eru dálkaðar við evnafrøðiligum lívfrøðiligum ella bakteriufrøðiligum tilfari. Bumburnar gera skaða bæði við fysisku ávirkanini av sjálvum bumbubrestinum og við, at dálkað tilfar verður spjatt yvir eitt størri ella minni øki.

## 7.0 Trygdartiltøk

**7.1** Tað er eitt krav fyri fulnaði at:

**7.2** Bygningar, ið skulu tryggjast, skulu kannast fyri rivur, áðrenn sprongt verður. Um rivur eru, skulu hesar staðfestast við fotografering.

**7.3** Tá sprongt verður nærri enn 5 m frá einum bygningi,

betri

# Spreingitrygging

skal tættborast (seymborast) tætt fram við bygninginum fyri hvørjar 20 cm, soleiðis at spreingigassið ikki fer inn undir bygningin. Hesi holini skulu ikki løðast.

**7.4** Tann, ið spreingir, skal hava neyðugar royndir og øll kravd loyvi fyri at útinna spreingiarbeiði.

**7.5** Áðrenn sprongt verður, skal breiðast væl og virðiliga út yvir spreingistaðið við spreingimáttum, og møguliga eisini við troli og/ella filti. Hetta serliga í tættbygdum øki.

**7.6** Tryggingartakarin sendir inn skjalprógv fyri: 1) Dag og klokkutíð fyri skaðahendingini 2) Útskrift frá ristimátara, ið vísir, hvussu stór svingferðin hevur verið, um felagið, tá tryggingin var teknað, hevur sett krav fram um ristimátara.

**7.7** Tann tryggjaði arbeiðstakarin í tryggingartíðini hevur teknað eina vanliga vinnuábyrgdartrygging.